UTTAN ÚR HEIMI

### Gav seg yvir

Maðurin, sum serbisku myndugleikarnir leingi hava lagt undir at hava skipað fyri morðinum á Zoran Djindjic, forsætisráðharra í mars í fjør, hevur nú givið seg yvir til løgregluna.

Milorad Lukovic, ið er kendur undir navninum Legija, var drukkin, tá hann sunnudagin kom á eina løgreglustøð í Beograd. Løgreglan heldur, at hann skipaði fyri morðinum á Djindjic. Tveir aðrir menn sita fongslaðir fyri morðið, og annar teirra, Zvezdan Jovanovic, hevur undir avhoyringum viðgingið, at tað var hann, sum skjeyt forsætisráðharran uttan fyri tinghúsið í Beograd.

Í meiri enn eitt ár hevur serbiska løgreglan leitað eftir tí 38 ára gamla Milorad Lukovic. Hann var fyrr leiðari hjá einari serdeild hjá serbisku løgregluni og hevur verið roknaður sum ein av stuðlunum hjá fyrrverandi forsetanum Slobodan Milosevic.

### Mæla til heilagt kríggj

Á einari heimasíðu mæla víðgongdir muslimar í Svøríki sínum trúarfeløgum til at fara í heilagt kríggj - ikki bara ímóti USA og Bretlandi, men eisini ímóti tí svenska samfelagnum, sum sagt verður í áheitanini.

Men tað eru serliga teir hóvligu muslimarnir í Svøríki, sum standa fyri skotum. Á heimasíðuni verður mælt muslimum til at gera seg inn á teir muslimarnar, sum svíkja ta muslimsku trúnna, og sum eru ímóti heilagum kríggi. Eisini verður sagt, at muslimar eiga ikki at hava kristnar og jødiskar vinir.

– Tað er skyldan hjá øllum rætttrúgvandi muslimum at fara í heilagt kríggj, og vit biðja Allah hjálpa teimum, sum eru vilst av leið. Tað er Allah, sum hevur givið okkum boð um at fara í heilagt kríggj, og tann, sum ikki fylgir boðunum, svíkir hann. Tey, sum ikki góðtaka ta sonnu trúnna, skulu sektast, verður millum annað sagt í áheitanini á svensku heimasíðuni. Næstformaðurin í muslimska trúarsamfelagnum í Svøríki, Mahmoud al-Deiba, sigur við TT, at hann fer at boða trygdarløgregluni frá, fær hann at vita, hvør hevur skrivað áheitanina.

### Indiánar gera uppreistur

Tann 7. apríl lupu einir hundrað krígsmálaðir indiánar á einar 200 gullgravarar har norðuri í Brasil. Tá avtornaði, lógu 29 gullgravarar eftirá, skriva brasilsku fjølmiðlarnir.

Løgreglan hevur nú tikið tveir av høvdingunum hjá indiánunum, og teir eru nú skuldsettir fyri at hava havt ábyrgdina av drápunum. Men málið er fløkt og kann koma myndugleikunum illa við, tí undir avhoyringunum hevur annar høvdingurin upplýst, at indiánararnir høvdu keypt álopsvápnini frá løgregluovastanum í landspartinum. Tað hevur sambært fjølmiðlunum havt við sær, at fleiri løgreglumenn eru tiknir og skuldsettir fyri ólógligan vápnahandil.

300.000 indiánar búgva í Brasil, og samanbresturin við gullgravararnar har norðuri í landinum er tann álvarssamasti í mong ár. Indiánarahøvdingarnir hava sagt, at teir fara at verja seg og síni øki ímóti gullgravarum og øðrum, sum ræna teirra ríkidømi.

### Flogskiparin sovnaði

Japanska flogfelagið ANA viðgekk um vikuskiftið, at flogskiparin á einum av flogførunum hjá felagnum sovnaði ikki minni enn tvær ferðir á einari ferð í síðsta mánað.

Flogfarið var av slagnum Boeing 767-300 og hevði 184 ferðafólk. Tá tað var komið í 12.000 metra hædd, linkaði flogskiparin, og sambært felagnum svav hann einar tveir ella tríggjar minuttir. Tann 50 ára gamli flogskiparin varð alt fyri eitt frítikin fyri at flúgva, og hann er nú til ymsar kanningar fyri at vita, um hann skal sleppa aftur til arbeiðis. At hann bleiv avdúkaður komst av, at júst á hesari ferðini var ein eftirlitsmaður hjá loftferðslumyndugleikunum komin umborð at kanna, at alt var í lagi.

Í februar í fjør sovnaði førarin á einum japonskum snartoki. Tokið koyrdi við 320 kiilometra ferð, og aftaná bleiv staðfest, at tað hevði koyrt 26 kilometrar, meðan tokførarin hevði sovið. 800 fólk vóru í tokinum.

# Sharon tapti men heldur fram

**Ariel Sharon tapti atkvøðugreiðsluna um afturtøku úr Gaza-geiranum, men ætlanin verður fullførd kortini**

ÍSRAEL
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*



*Ein ísraelsk kvinna og hennara fýra døtur doyðu í einum palestinskum álopi sunnudagin*
*Mynd: Reuters*

Floksfelagarnir hjá ísraelska forsætisráðharranum, Ariel Sharon, tóku ikki undir við ætlan hansara um at taka ísraelska herin úr Gaza-geiranum og at flyta tey jødisku niðursetufólkini haðani.

Politiskir eygleiðarar í Jerusalem eru á einum máli um, at úrslitið av atkvøðugreiðsluni í Likud-flokkinum var ein lemjandi ósigur fyri Sharon, men fyribils er einki, sum bendir á, at úrslitið fær nakrar beinleiðis avleiðingar. Á høgravonginum eru tey sera væl nøgd við úrslitið, meðan vinstravongurin við Shimon Peres á odda hevur kravt nýval.

Men Ariel Sharon fer ikki frá. Hann vísir á, at atkvøðugreiðslan í Likudflokkinum var ikki bindandi fyri stjórnina, og at hann hevur gjørt av at halda fram við afturtøkuætlanini.

Ætlanin hjá Sharon ber eisini í sær, at fýra jødiskar niðursetubygdir á Vsetara Áarbakka skulu niðurleggjast, og tað hevur elvt til sera hvøss mótmæli frá niðursetufólkunum. Ivaleyst ávirkaði tað eisini valið, at tveir palestinar skutu eina niðursetukvinnu og hennara fýra døtur sunnudagin. Tveir palestinskir bólkar átóku sær ábyrgdina av tilburðinum, sum teir søgdu vera hevnd fyri, at Ísrael hevur beint fyri tveimum leiðarum í Hamas.

# Tað gloymda fólkamorðið

**Fólk í túsundatali eru myrd, og onnur í hundraðtúsundatali eru rikin frá húsi og heimi í sudanska landspartinum Darfur. Men altjóða samfelagið letur eyguni aftur**

FÓLKAMORÐ
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

– Hetta er tann ringasta vanlukkan av sínum slagi í heiminum júst nú. Tað, sum hendir her, er etnisk útreinskan eins og tað, sum vit sóu í Rwanda fyri tíggju árum síðani. Tá segði altjóða samfelagið, at slíkt mátti ongantíð henda aftur.

Soleiðis segði ST-umboðsmaðurin í Sudan, Mukesh Kapila, fyri einum góðum mánað síðani, men enn hevur heimasamfelagið einki gjørt fyri at steðga áganginum í Darfur.

Norski tíðindamaðurin Espen Rasmussen, sum júst hevur vitjað landspartin, skrivar í blaðnum VG, at sambært hjálparfelagsskapum eru 750.000 fólk rikin frá húsi og heimi, og 140.000 teirra eru flýdd til grannalandið Tjad. Søgurnar eru ræðuligar, sigur hann.

– Menn úr Jinjaweedherinum komu til bygd okkara. Teir drupu brøður mínar og ein skyldmann og neyðtóku kvinnurnar. Síðani drupu teir børnini og settu eld á øll húsini, greiðir tann 73 ára gamli Arbab Adam Abdullah frá. Eftir at hava fjakkað í fimm samdøgur eydnaðist tað honum at sleppa til eina flóttafólkalegu í Tjad. Og hann hevur ongar vónir um framtíðina.

– Vit fóru frá øllum, sum vit áttu, og her hava vit einki. Eg havi onga framtíð her, og eg veit ikki, hvat fer at henda børnum okkara. Hvussu skal eg fáa teimum mat, og hvussu skal eg hjálpa teimum at sleppa í skúla, spyr hann.

Í flóttafólkaleguni, sum Espen rasmussen vitjaði, búgva 7.000 fólk í tjøldum. Hjálparfelagsskapurin Læknar uttan landamark roynir at hjálpa teimum, men kortini er stórur tørvur á ymsum vørum. Heldur ikki í leguni kenna tey seg trygg, tí tað hendir meiri enn so, at hermenn hjá Jinjaweed koma um markið at drepa og stjala.

– Okkum tørvar mat. Vit hava einki. Vit svølta, sigur ein av flóttamonnunum við norska tíðindamannin.

ítróttur
Nr. 84 • týsdagur • 4. mai 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

# Betri enn HM

**Føroyski liðskiparin, sum eisini varð kosin besti strikuspælarin í kappingini, var ivaleys í, at talan hevur verið um eina framúrlæruríka ferð í Italia. Eina ferð, sum samstundis hevur verið ein risa-uppliving**

CHALLENGE-TROPHY
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Hetta er nógv betri enn t.d. ein HM-dystur móti Svøríki, har vit í besta føri kunnu hugsa um at avmarka tapið, helt Gunnleyg Berg, tá silvurmerkin í Challenge-Trophy kappingini vóru veruleiki*

**Mezzocorona, Italia:** Á seinastu venjingini undan Challenge-Trophy kappingini í Italia høvdu vit eitt stutt prát við Gunnleyg Berg, sum var føroyskur liðskipari á ferðini.

Millum annað segði hon ta ferðina, at hon helt tað avgjørt vera neyðugt við slíkum avbjóðingum til eitt føroyskt kvinnulandslið, men samstundis legði hon dent á, at hon einki visti um støðið í kappingini, og at hon tí ikki kundi siga so øgiliga nógv um, hvat var í væntu.

### Akkurát tað

Men nú fimm dagar seinni, er einki at ivast í, at talan var um hondbólt á einum støði, ið var sum skapt til føroyska liðið. Liðið fekk ikki færri enn fimm harðar dystir, har endaliga úrtøkan gjørdist silvur, og nógv meira enn tað, ber væl illa til at krevja. Ikki minst tá tær í finaluni hittu eitt italskt lið, sum í roynd og veru var alt ov sterkt til at taka lut í kappingini.

– Hetta var akkurát nakað, sum hóskaði væl til okkum. Sjálvt um tað bara var eitt lið, sum var betri enn vit, so høvdu vit alla tíðina harða mótstøðu, soleiðis at fingu eina rúgvu burturúr hvørjum einasta dysti. Nógv betri enn t.d. ein HM-dystur móti Svøríki, har vit í besta føri kunnu hugsa um at avmarka tapið.

– Og samstundis hevur hetta verið ein risa-uppliving fyri okkum. Vit vistu jú einki sum helst um nakað av londunum, tá vit komu, og so at uppliva dystirnar og koma at práta við hini liðini, var veruliga stuttligt.

### Trúgvin eftir fyrsta dystin

Hóast tað illa bar til at gita nakað um føroysku møguleikarnar undan kappingini, so mundi fyrsti dysturin móti Belgia tó geva eina ábending um, hvat var í væntu. Ikki minst tí Belgia fyri tveimum árum síðani endaði á øðrum plássi í kappingini.

Talan gjørdist tó um ein tryggan sigur í tí dystinum, og eftir hetta sigur Gunnleyg, at tær av álvara fóru at trúgva uppá eitt gott úrslit.

– Tá vistu vit í øllum førum, at vit væl kundu vera við, og so var tað bara at koyra á alla tíðina, heldur hon, og roynir samstundis at sníkja seg uttanum spurningin, sum varð settur, um hvussu tað kendist at vera kosin besti strikuspælarin í kappingini.

### Tilvildin spælir við

Gunnleyg hevur hesi seinnu árini leikt hondbólt í Danmark, og tað er einki at ivast í, at hon her hevur gjørt stór framstig.

Spurd, um ein slík uppliving sum hendan kann eggja henni til at gera enn meira við hondbóltin, er hon tó eitt sindur ivandi.

– Bæði og. Eg ætli mær so í øllum førum at halda fram á tí støðnum, har eg nú spæli. Men spurningurin er, um eg eri før fyri at gera meira. Við venjing fimm ferðir um vikuna er í øllum førum sera trupult at seta meira tíð av til hondbóltin, tí skúlin má jú eisini prioriterast.

- Hinvegin skal man ongantíð siga ongantíð. Kemur onkur óvæntaður møguleiki um at gera meira við hondbóltin, so kann væl vera, at eg taki av, men tað er ikki til at siga, um slíkir møguleikar koma. T.d. fekk eg mest sum av tilvild ein einastandandi møguleika fyri nøkrum árum síðani, tá eg spældi eitt ár í Íslandi, so hvør veit, sigur hon at enda.

### Ein livandi legenda

Ofta verður havt á munni, at italskir frásøgumenn eru nakað heilt fyri seg. Tí skuldi tú ikki hildið, at ein norðbúgvi soleiðis uttan víðari kundi læra teir nakað í so máta, men tað var tó júst tað, sum Hilmar Jan Hansen gjørdi á ferðini.

Eftir hálvfinalusigurin á Finnlandi fóru tey enntá at tosa um, at skuldi hasin maðurin framhaldandi verða í høllini, so máttu tey byggja eitt glasbúður til hann, soleiðis at hann ikki órógvaði aðrar áskoðarar í høllini.

Og heima í Føroyum lótu tey, sum tað skiltist, eisini væl at. Onkur kallaði hann enntá fyri mest partíska frásøgumannin nakrantíð, men so leingi tað er í okkara parti, man tað fara at vera í lagi.

**-jm**



*Italienarar eru vanir við eitt sindur av hvørjum, men ein somikið ídnan frásøgumann høvdu tey ongan tíð í lívinum sæð*